


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 26 - 11 - 2011

# Supply Service byggja í Havn

Supply Service, sum í mong ár hevur hildið til í Leirvík, ger nú klárt til at flyta til Havnar. Vaksandi virksemið hjá felagnum setir størri krøv til skrivstovu og arbeiðshøli annars á landi, og tí hava eigararnir tikið avgerð um at flyta alt virksemi felagsins til høvuðsstaðin. Felagið hevur keypt ognina á Skansavegi 7, har skrivstovan hjá Norðoyartunnlinum hevur hildið til. Ætlanin er at taka bygningin niður og byggja ein nýggjan á staðnum. Her fara tey umleið 10 starvsfólkini at arbeiða, men pláss verður fyri tvífalt so mongum. Supply Service eigur veitingarskipini Eldborg og Saeborg. Haraftrat eru tvey líknandi skip ávegis. Sjóborg verður liðugt í apríl næsta ár og Tórsborg í juli. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri sigur annars, at felagið fylgir væl við gongdini í Føroyum, har Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum fara at bora á føroyska landgrunninum í apríl. Tá verður eisini brúk fyri veitingarskipi og dylur stjórin ikki fyri, at teir fara at gera sítt til at fáa eina slíka uppgávu. Vit gera sjálvandi alt fyri at fáa sáttmálar til nýggju skipini, og hevði tað verið kærkomið at kunnað fingið uppgávuna at veita tænastur til komandi leitingina við Føroyar. Myndir Nýggja Saeborg komin til Havnar Heðin Mortensen, borgarstjóri stýrir Havnini. Her roynir hann eisini at stýra nýggjasta farinum í flotanum. Hann kann gleða seg tll, at reiðaríið nú flytur til høvuðsstaðin. Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller